## Postbilar á frímerki




Flutningsbilar hava í fleiri ár verið brúktir á donskum frímerkjum. Í ár eru tað danskar postsúkklur og postbilar. Ein Nimbus motorsúkkla við síðuvogni, ein Bedford vørubilur, ein Renault 4, sum vit eisini høvdu her í Føroyum, áðrenn postverkið varð yvirtikið, og ein Volvo trailari

*Kelda: Transport Magasinet*

## Skoda undir í vatni



Vatnflóðirnar í Miðevropa hava gingið hart út yvir VW konsernina. Serliga hjá Skoda og VW í Leipzig. Hjá Skoda í Tjekkia stóðu fleiri hundrað nýggir bilar undir í vatni uttanfyri verksmiðjuna

*Kelda: Motor Magasinet*

## 600.000 Fabia



Síðan Skoda Fabia kom á marknaðin um heystið 1999, hevur verksmiðjan í Tjekkia framleitt 600.000 bilar. Teir fyrstu vóru hatchback, í 2000 kom Combi og í 2001 kom sedan útgávan á marknaðin

*Kelda: Motor Magasinet*

# Johan Beder – koyrilærarin arbeiðir sum verkførari

**Bilmekanikarin og koyrilærarin á Kambsdali, Johan Beder, arbeiðir nú sum verkførari á plátu- og lakkeringsverkstaðnum hjá Reyni Service í Hoyvík.**

VERKFØRARI
*Magnus Gunnarsson*




*Johan Beder er útbúgvin bilmekanikari og koyrilærari. Hann arbeiðir í dag sum verkførari á plátu- og lakkeringsdeildini hjá Reyni Service*

Johan Beder, ið er best kendur sum koyrilærari, arbeiðir nú sum verkførari hjá Reyni Service. Johan er úr Fuglafirði. Hann lærdi til bilmekanikara á bilverkstaðnum hjá Bjarna Eliasen í Fuglafirði frá 1979-83. Eftir tað arbeiddi hann hjá Bjarna Eliasen til 1989, har hann var verkførari tá Bjarni var til skips. Síðan arbeiddi hann á Volvo verkstaðnum hjá Brøður Petersen í Fuglafirði frá 1989 til 1990, tá hann fór til Danmarkar á koyrilæraraskúla í umleið 1 ár. Síðan arbeiddi hann sum koyrilærari fulla tíð til 1998. Hann hevði egnan bilverkstað á Kambsdali frá 1998-2000, samstundis sum hann eisini koyrdi skúlakoyring. Í 2001 hendi tað, at bilur hansara bleiv ákoyrdur aftanífrá, og Johan fekk skaða í ryggin. Hetta førdi við sær, at hann varð noyddur at fáa sær annað arbeiði. Hann kundi ikki halda fram sum koyrilærari. Johan arbeiðir í dag sum verkførari á plátu- og lakkeringsverkstaðnum hjá Reyni Service. Leiðari á deildini er Páll á Teiginum.

# Toyota Corolla - nú eisini sum sedan

**Tá nýggja Corolla serian kom higar fyrst í árinum, var tað eitt ivamál um Corolla sedan, ið verður gjørdur í Turkalandi, fór at koma hendan vegin. Men nú er bilurin komin til landið sum sedan við fýra hurðum og stórum viðførisrúmi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Corolla bleiv eins væl móttikin her hjá okkum sum í restini av Evropa og aðrastaðni við. Bilurin er designaður við evropeiska marknaðnaðinum fyri eyga. Corolla sedan verður verður framleiddur í Turkalandi, og er eins og hinir Corolla bilarnir sera rúmligur í allar mátar. Viðførisrúmið er heilar 428 litrar, ið má sigast at vera stórt fyri ein bil í hesum klassanum. Bilurin er góðar 20 cm longri enn hatchback, tað er sama longd sum stationvognurin.

Komforturin og koyrieginleikarnir eru, eins og í hinum útgávunum, heilt í topp.

Tríggir motorar eru at velja í.Tveir bensinmotorar, ein 1.4 litur VVTi við 97 hk, ein 1.6 litur VVTi við 110 hk. Síðan er tað 2.0 litur D-4D dieselmotorurin við commonrail innspræning við 90 hk. hesin koyrir 17,5 km/l. Nú fæst Corolla sum hatchback við 3 og 5 hurðum og sum T Sport, sum stationcar, Verso og nú eisini sum sedan. Harvið er Corolla serian við at verða heilt komplett.





*Nýggi Corolla er nú komin sum sedan. Viðførisrúmið er heilar 428 litrar*

### Toyota Corolla 1.6 Terra sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.6 litur 4 syl. VVTi við 110 hk |
| 0-100 | km/t 10,2 sek |
| Bensinnýtsla | 14,3 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 439,0 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 147,0 cm |
| Eginvekt | 1200 kg |
| Prísur | kr. 191.600,- |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www.reyniservice.fo |



# Tvey stjørnuskot hava konsert saman

**Føroyski Brandur Enni og Íslendska Jóhanna Guðrún**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Brandur er okkara Jóhanna ella umvent. Allir íslendingar kenna Jóhannu Guðrún, sum 10 ára gomul sang seg inn í hjarta hjá børnum og vaksinum í Íslandi. Hennara fyrsta fløga seldi meira enn Bubber og Bjørk í heimlandinum, og nú hon fyllir 12 ár er Ísland ov lítið til hennara.

Hetta seinasta summarið hevur hon verið í Florida. Á næstu fløguni skal hon syngja á enskum og við síni yndisligu kláru rødd kann Jóhanna Guðrún bráddliga gerast ein víðagitin pop stjørna.

Brandur Enni hevur rokkið hægstu tindarnar her heima og við síni veingjaðu rødd hevur 13 ára gamli tvøroyadrongurin fingið tað flogið, sum kann vera hann víðari fram á leið.

Á nýggju fløguni hjá Brandi, sum verður marknaðarførd uttanfyri Føroyar út heyst, syngja hann og Jóhanna Guðrún eisini duettina „Still Friends" saman. Tey møttust fyrstu ferð í Íslandi februar 2001 og hittust aftur í mai 2002. Nú trína tey á pallin saman í vakra mentanarhúsinum í Fuglafirði, leygardagin 28. september klokkan 20.

So tað er lagt upp til eina stóra konsert í Fuglafirði við veingjaðum røddum úr norðuratlantarhavinum. Ein genta og ein drongur, sum bæði hava víst sínar dygdir á palli og á fløgu. Ein konsert við sangum á føroyskum, íslendskum og enskum. Ein samanrenning millum samáar tjóðir, sum vilja hoyrast í framtíðini. Eitt vikuskiftið har sangir verða sungnir og søga verður skrivað.



*Íslendska barnastjørnan Jóhanna Guðrún kemur til Fuyglafirðar at syngja saman við Brandi enni*

*Brandur er í løtuni í Danmark og syngur sangir til sína nýggju fløgu*



STARVSLÝSING



STARVSFÓLK TIL
TELEFON-MÓTTØKUNA

*Tryggingarfelagið Føroyar S/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn og 5 deildir kring landið. Tryggingarfelagið Føroyar selur allar tryggingar bæði til privatkundar og til vinnukundar. Í felagnum arbeiða uml. 120 fólk. Øll starvsfólk í felagnum fáa eina grundleggjandi tryggingarfakliga útbúgving, og verða víðariútbúgvin innan starvsøki teirra.*

Elskar tú at tosa í telefon? Er svarið Ja, so er hetta starvið kanska nakað fyri teg!

Vit søkja eftir einum fólki til at røkja telefonmóttøku okkara. Tú kemur at arbeiða í einum toymi, har tú saman við góðum starvsfeløgum hevur ábyrgdina av, at fyrsta samskiftið við kundan er ein fragd.

Tínir persónligu eginleikar eru:
- Tær dámar væl at samskifta við øll fólk
- Tú hevur "smíl" í røddini
- Tú dugir væl at samstarva
- Tú ert álítandi og røkin

Tú verður ein sentralur persónur í arbeiðinum at náa telefonmálsetningum felagsins. Samstundis verður tú partur av einum nýggjum deildarumhvørvi, har neyðug útbúgving er ein náttúrligur partur av gerandisdegnum.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og AFF.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Henry Olsen, deildarstjóra, tlf. 345509 ella til Rannuá Leonsdóttir, tlf. 345600.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við viðkomandi skjølum innan tann 4. oktober 2002 til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postbox 329
FO-110 Tórshavn

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo